

Tann klassiska

Okkara maður í Havana

Graham Green

Bretin Wormold selir dustsúgvarar í Havana í 1950'unum, men tá hann verður lokkaður at njósnast fyri bretsku fregnartænastuna, eru góð ráð dýr. Wormold finnir upp á hernaðarútbyggingar og gevur njósnaratænastuni tekningar av nýggjum dustsúgvara. Hann sigur seg eisini hava samband við týðandi fólk, sum kunnu geva honum upplýsingar. Samstundis sum pengar renna inn í kassan fyri njósnaravirksemið, verður støðan hjá Wormold og hansara »keldum« alt meira vandamikil. Ein klassisk njósnarasøga og politisk satira hjá meistaranum Graham Greene.



Tann loyndarfulla

Little Fires Everywhere

Celeste NG

Listakvinnan Mia Warren flytur saman við tannáringadóttrini til eitt friðarligt og harmoniskt íbúðarøki í Shaker Heights í Cleveland. Íbúgvarnir eru hampuligir og heiðurligir. Elena Richardson er ein ímynd av fólkinum í grannalagnum, og skjótt verða børnini í Richardson-familjuni drigin at tilflytarunum, sum tykjast spennandi. Ein myrk og loyndarfull fortíð goymir seg tó undir vatnskorpuni, og skjótt verður lívið í Shaker Heights órógvað, tá ið eitt par í grannalagnum skal ættleiða eitt barn við kinesiskum-amerikanskum ættarbondum. Nú daga loynidómar undan, og tað gongdur fram ímóti dramatiskum samanbresti.



Tann upplýsandi

The Book of Dead Philosophers

Simon Critchley

Í 1626 vildi heimspekingurin Francis Bacon kanna, um tað bar til at goyma kjøt í frosti. Nakað uttan fyri London keypti hann ein høsnarunga, drap hann og gróv hann niður í kavan. Bacon fekk lungnabruna og doyði fáar dagar seinni. Hetta er ein av mongu søgunum í bókini, sum greiðir frá, hvussu 221 kendir og minni kendir heimspekingar doyðu. Rithøvundin heldur, at søgurnar siga nakað um lívið og deyðan, og í øllum førum er bókin væl skrivað, og hon er bæði upplýsandi og undirhaldandi at lesa.

Tann lærurika

Forstå populismen

Anna Libak

Populisma er ikki orsøkin til trupulleikarnar hjá vesturheiminum – hon er ein avleiðing av alheimsgerðini, sum er farin ov langt. Tað er ein av boðskapunum í nýggjari bók hjá journalistinum Anna Libak. Hon vísir á, at populisman, sum sæst í politiska heiminum, er ein fylgja av, at veturheimurin er blivin veikari búskaparliga, mentanarliga og demografisk samanborið við onnur sterk øki í heiminum. Tí er eftirspurningur eftir onkrari ideologi, sum kann venda gongdini. Ein áhugaverd bók við viðkomandi ískoyti til kjakið.



Tann spennandi

Macbeth

Jo Nesbø

Norski krimirithøvundin Jo Nesbø hevur skrivað enn eina spenningssøgu, sum fangar frá tí fyrsta til tað síðsta. Søgan gongur fyri seg í einum lítlum býi í norði, har tað regnar illa. Løgreglumaðurin Macbeth er fyrrverandi rúsevnismisnýtari, og hann stríðist ímóti bæði brotsmonnum og sær sjálvum. Hann ásannar, at hann fer ikki at fáa tað vald, hann ynskir, uttan hann er til reiðar at drepa fyri tað. Jo Nesbø hevur lánt frá Shakespeare og hevur vavt tað upp í eina spennandi krimisøgu, har nógv kann ganga galið.



Tann undirhaldandi

Mínar hejtur

Jørgen Leth

Danski rithøvundin og filmsmaðurin Jørgen Leth skrivar beista væl. Í hesari bókini hugleiðir hann um sínar hetjur, og tað ger hann á hugtakandi hátt. Hann skrivar um kendar súkklarar, jazztónleikarar, sjónleikarar, listarfólk og onnur. Honum dámar ikki hugtakið «fyrimynd«, men »hetjurnar« lýsa sambært honum í náttarmyrkrinum. Skrivihugurin drívur bókina, sum er undirhaldandi og løtt at lesa.

Tann djarva

The Face of War

Martha Gellhorn

Hon varð kend sum kona rithøvundan Ernest Hemingway, men hon var nógv meira enn tað. Hon skrivaði seg væl og virðiliga úr skugganum hjá manninum, og sum kvinnuligur krígskorrespodentur skuldi hon mangan stríðast ímóti fordømum og forðingum. Í einum savni av reportasjum skrivar Gellhorn um spanska borgarakríggið og um seinna heimsbardaga, um slagmarkir og sjúkrahús, um fallandi bumbur og um týningarlegur. Hetta er slóðbrótandi skriving, sum framvegis er viðkomandi og upplýsandi.